# Fáir áskoðarar

Tað var ikki bara føroyskur hondbóltur, sum var á skránni sunnudagin, og hetta sást eisini aftur í áskoðarafjøldunum, sum høvdu leitað sær til hondbólt. Samstundis, sum føroysku dystirnir vóru á skránni, varð HM-finala í hondbólti spæld í Kroatia, og í Liverpool var stórdystur á skránni í Premier League. Hetta sást eisini á áskoðarabenkrunum, soleiðis sum myndin hjá myndamanni okkara so væl vísir.



# Saviola liðugur í Real

Argentinski álopsspælarin Javier Saviola sleppur ikki rættiliga fram at liðnum í Real Madrid, og nú skriva sponsk bløð, at Saviola verður seldur í summar. Ætlanin var, at Saviola skuldi seljast nú, men Klaas-Jan Huntelaar kann ikki spæla Champions League dystir fyri Real Madrid, og tí vil felagið hava Saviola í hópinum fram til summarsteðgin.

# Ingo er deyður



*Ingemar Johansen gjørdist heimsmeistari í tungvekt, tá hann í 1959 vann á Floyd Patterson. Her er hann í dystin móti Joe Bygraves í Gøteborg í 1956*

*Mynd: Polfoto/Stella*

**Svenska boksilegendan, Ingemar Johansson doyði ígjár, 76 ára gamal**

NEVALEIKUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Ein av størstu legendunum í svenskari ítróttarsøgu, arbeiðarasonurin úr Gøteborg, Ingemar "Ingo" Johansson doyði ígjár í heimbýnum, Gøteborg 76 ára gamal. Seinastu árini livdi Ingo ikki væl, og hevði hann alzheimersjúkuna. Ingemar "Ingo" Johansson gjørdist heimsgitin, tá hann tann 26. juni í 1959 gjørdist heimsmeistari í tungvektsboksing. Minniligu finaluna vann á einum øðrum legendariskum boksara, nevnliga Floyd Patterson. Dysturin vardi bert trý umfør, til dómarin steðgaði dystinum, tí tá hevði Ingo sligið Patterson í gólvið fleiri ferðir. Seinni vann Patterson tó á Ingo á tveimum sinnum.

### Fylgdu við í Føroyum

Ingo vann eisini OL-silvur í Helsinki í 1952, og seinni vann hann eisini europameistaraheitið í tungvektsboksing. Hann hevði eitt tiltikið hart slag, og vóru mótstøðumennirnir hjá honum nógv í verjustøðu, fyri at sleppa undan tiltiknu sløgunum hjá Ingo. Tá Ingo vann gjørdist heimsmeistari tann 26. juni í 1959 sótu heilar tríggjar miljónir svenskarar uppi, fyri at fylgja við í svenskum útvarpi. Eisini í Føroyum sótu fólk uppi hesa náttina, fyri at fylgja svenska útvarpinum á millumbylgju. Millum teirra, varð pápi tann, sum skrivar hesar reglur. Hann sat uppi um náttina norðuri í Fuglafirði, fyri at fylgja við tí spennandi boksidystinum. Seinast í 1950-unum, og fyrst í 1960-unum varð Ingo tann kendasti norðurlendski ítróttamaðurin í Heiminum. Nógv ítróttarlið í Svøríki hava havt tøgn í ein minutt í dag, fyri at minnast stóra ítróttarmannin, Ingemar Johansson. Ingo var ein maður av fólkinum, sonur ein kommunalan arbeiðsmann, og fólkahetja í Gøteborg. Í Gøteborgsposten er tað vorðið fólkakrav, at standmynd verður reist av Ingo.



*StÍF fekk hesaferð Kyndil niður á gólvið, og við sigrinum elta strandingar framvegis lítla møguleikan fyri finaluplássinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

StÍF-Kyndil 28-20 (10-8):

# StÍF livir í vónin

**Greiði sigurin á Kyndli í gjár prógvaði, at StÍF framvegis skal takast í álvara. Teir eru fýra stig frá FM-finaluni, og komandi vikurnar skulu teir av álvara til próvtøku, tá H71 og Neistin bíða**

HONDBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Fýra stig. Fyrst H71, so Neistin. Nú ella ongantíð.

Tað skuldi verið týðiliga fyri øll rundan um felagið StÍF. Komandi vikurnar fara at avgerða, um teir skulu eiga lut í finaluni um FM-heitið. Greiði sigurin á Kyndli í gjár prógvaði, at StÍF skal takast í álvara, og at havnarmenn og hoyvíkingar kunnu fáa kapping til tað seinasta um finalupláss.

### Greitt omaná

Sigurin á Kyndli var fult uppiborin. Í fyrra umfarinum var javnt, men eftir hvíldina setti heimaliðið ferð á, og tá høvdu gestirnir ongan møguleika. Serliga var trupult hjá grøna havnarliðnum at verja fyri Mortan Hansen, sum eisini var toppskjútti við 10 málum. Tað merktist væl hjá Kyndli, at Høgni Klein Olsen ikki var við, vegna skaða. Ov ofta vóru loysnirnar í álopsspælinum tær somu, og serliga í seinna hálvleiki manglaði hugflogið. Verjuparturin riggaði væl hjá báðum liðum í fyrra umfarinum, meðan teymarnir vóru meira leysir eftir hvíldina.

StÍF hevði munin allan dystin, og vann tá avtornaði við 28-20.

Toppskjúttar hjá Kyndli vóru Janus Einar Sørensen og Bárður Johannesen, sum skutu seks mál hvør.

### Liva í vónini

StÍF livir framvegis í vónini um finalupláss. Tað eru fýra stig sum skilja teir frá Neistanum, sum í løtuni liggur á øðrum plássi. Og um tvær vikur skulu strandingar vitja í Hoyvíkshøllini. Tá verður avgjørt, um liðið skal fáa enn ein møguleika at ota seg nærri oddinum. Kyndil, hinvegin, kann bjarga kappingarárinum við at vinna steypafinaluna komandi vikuskifti. Teirra leiklutur í landskappingini verður nú at stjala stig frá ovaru liðunum.

## FAKTA um dystin

**StÍF-Kyndil 28-20 (10-8)**
10 min: 2-2
20 min: 7-4
40 min: 16-11
50 min: 22-15
**Málskjúttar**
**StÍF:** Mortan Hansen 10(3), Bárður Danielsen 5, Rúni Niclasen 4, Hávardur Trúgvason 3, Cristian Preda 3, Andre Danielsen 2, Pauli G. Hansen 1
**Kyndil:** Bárður Johannesen 6(1), Janus Einar Sørensen 6(2), Jónleif Sólsker 4, Hans Áki Dal-Christiansen 2, Hans Arni B. Thomsen 1, Josef Abrahamsen 1
**Brotskøst:** StÍF 3, Kyndil 5
**Útvísingar:** StÍF 3, Kyndil 2
BKristian Joensen & Karstin Joensen

**Hondbóltur**

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 14 | 11 | - | 1 | - | 2 | 367 | 287 | 80 | 21 |
| 2 VB | 13 | 9 | - | 0 | - | 4 | 359 | 293 | 66 | 18 |
| 3 Tjaldur | 13 | 7 | - | 3 | - | 3 | 352 | 314 | 38 | 18 |
| 4 Neistin | 13 | 6 | - | 2 | - | 4 | 326 | 306 | 20 | 15 |
| 5 StÍF | 14 | 3 | - | 0 | - | 11 | 342 | 409 | -67 | 6 |
| 6 Kyndil | 13 | 0 | - | 0 | - | 13 | 224 | 361 | -137 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 13 | 11 | - | 0 | - | 2 | 361 | 331 | 23 | 22 |
| 2 H71 | 14 | 8 | - | 0 | - | 6 | 371 | 329 | 42 | 16 |
| 3 Neistin | 13 | 8 | - | 0 | - | 5 | 380 | 368 | 12 | 16 |
| 4 StÍF | 14 | 6 | - | 2 | - | 6 | 345 | 336 | 9 | 14 |
| 5 Kyndil | 14 | 4 | - | 2 | - | 8 | 340 | 371 | -31 | 10 |
| 6 KÍF | 14 | 2 | - | 0 | - | 12 | 327 | 389 | -62 | 4 |